# ÁRSINS VITANARFRÓÐU



## HVÍ ER FLÓÐ OG FJØRA, OG HVAT ER ORSØKIN TIL, AT TAÐ IKKI ER FULL FLÓÐ/FJØRA ALLASTAÐNI Í FØROYUM SAMSTUNDIS?




Granskarar: Johan Waagstein, Robbin S. Ørvarodd, Boas E. Høgnason, Sanna J. Danielsen, Lilja R. Báradóttir, Jóan M. Jakobsen og Amanda S. Davidsen

# INNGANGUR

Vit hava í náttúru og tøkin arbeitt við feltgransking saman við FNU. Í tí sambandi skuldu vit vera í fjøruni 45 minuttir áðrenn fulla fjøru, og seta kassar upp, so at vit kundu skráseta ymiskt í fjøruni. Men av tí at flóð og fjøra ikki altíð er so lætt, so eydnaðist tað ikki heilt eftir vild.

Granskingarleiðarin hevði spurt seg fyri, nær tað var full fjøra eitt ávíst stað ein ávísan dag, men hevði ikki fingið rætta tíð at vita, við tí úrslitið, at vit ikki møttu upp í fjøruni rætta tíðspunkt , og fingu tískil ikki skrásett tað vit skuldu.

Hetta fekk okkum at undrast á, hvat fyribrigdi flóð og fjøra er?

Tað hevði verði deiligt um vit sjálvi kundu finna út av, nær flóð og fjøra er. Tí har mann ikki er sjálvur, er mann bara hálvur.

Lærarar: Malan Petersen malan.petersen@skulin.fo & Turið Á  Tórgarði turi.a.torgardi@skulin.fo

Luttakarar: Náttúru og tøkni, 4-6 flokkur. Í hesum bólkinum eru:

Johan Waagstein, Robbin S. Ørvarodd, Boas E. Høgnason, Sanna J. Danielsen, Lilja R. Báradóttir, Jóan Magnus Jakobsen og Amanda S. Davidsen

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring.

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á
2. Hví er tað so
3. Leggið eina ætlan
4. Savnið upplýsingar
5. Hetta eru vit komin fram til
6. Sigið øðrum frá

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hví er flóð og fjøra, og hvat er orsøkin til, at tað ikki er full flóð/ fjøra allastaðni í Føroyum samstundis?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit halda at mánin hálar upp á onkran máta, so tað verður flóð og fjøra.

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

- Seta okkum í smáar bólkar at googla
- Spyrja ymisk fólk í bygdini, sum vita hvat ávirkar flóð og fjøru.
- Lesa í bókum.
- Tá ið bólkarnir hava funnið útav ymiskum,  seta vit okkum í ein stóran bólk, og seta alt saman í eitt skjal.

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR

- Atli Poulsen
- noaa sci jinkss á *https://scijinks.gov/tides/*
- STEAMspirations á *https://www.youtube.com/watch?v=qRikvIUqZFg*
- AumSum time á *https://www.youtube.com/watch?v=cm7T1Etl2XY*
- brainstuff-howstuffworks á  *https://www.youtube.com/watch?v=5ohDG7RqQ9I*
- Bárður Isaksen
- Au.dk á *https://projekter.au.dk/havet/forloeb/forloebsoversigt/havets-energi/tidevand/tidevand-opstaar*
- Joen Remmer ( flogskipari)
- Joen Jacob Andreasen
- Havið [1]
- Álmanakkin 2023
- Rákið ár 2023

[1] Bogi Hansen

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Mánin hálar í Jørðina, men mánin klárar ikki at hála í grótið, so mánin hálar í vatnið í staðin. Tann síðan av Jørðini, ið er tættast mánanum hevur flóð.




Tá ið Mánin, Jørðin og Sólin eru í beinari linju (fullmáni ella nýmáni) verður størstur munur á flóð og fjøru.

Tað tekur 27,3 dagar hjá mánanum at fara rundan um Jørðina.

Tað eru 6 tímar ímillum flóð og fjøru, men tá tað verður full flóð stendur vatnstandurin stillur í 12,5 minutt, og síðani byrjar tað aftur at fjara, og tá ið so 6 tímar eru farnir aftur er so full fjøra og stendur hon í 12,5 minutt, og soleiðis blívur tað bara við.

Um vatnið rekur norður eftir, so rekur tað fyrst á Suðuroynna. Tað vil siga, at tað tekur longri at koma yvir til hinar oyggjarnar, tí tað skal fara framvið nógvum oyggjum. Onkra staðni er sundini smøl, og tá tekur tað nógv longri tíð hjá vatninum at koma ígjøgnum, enn har, tað er gott pláss. Har

vatnið hevur rikið er nokkso stilt eina løtu . Onkra staðni eru tað stór glopp og onkra staðni er tað lítil glopp.

Flóð og fjøra verður sum sagt ávirka nógv av, bæði dýpd og vídd. Um vit hava eitt smalt sund sum sjógvur pressar seg ígjøgnum, verður størri munur á flóð og fjøru, enn í einum breiðum sundi. Tað er heilt einfalt ikki eins gott pláss fyri tí nógva vatninum í tí smala sundinum, sum í tí breiða og tí ávirkar tað vatnstandin.

Men onkrastaðni hevur hvørki mánin ella rákið nakað at gera við flóð og fjøru. Í eitt nú Kollafirði er tað bara lufttrýstið, sum hevur nakað at siga. So tá ið tað er hátrýst verður sjógvurin trýstur niður og tað fjarar, og tá tað er lágtrýst hevur sjógvurin hug at fylla fjørðin og tað fløðir.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit hava valt at geva okkara vitan víðari á skúlanum, og nú eisini til tykkum.